KROSS RÐ GÁTA

Krossorðagátan kemur nú aftur

Sosialurin heldur nú fram við tiltakinum at hava eina krossorðagátu hvønn leygardag. Gátuskrivarin hjá okkum hevur verið í summarfrí, men er nú afturkomin. Vit hava sett honum nakrar spurningar:

Hvar royndi tú at leggja støðið, skulu gáturnar vera lættar ella tvørligar at loysa?

– Eg haldi, at tær løttu, sum eru í nógvum vikubløðum, eru keðiligar í longdini. Einaferð royndi eg at loysa tær uppá tíð, og tað tók 5–6 minuttir at loysa eina heila síðu.

Hendan, sum er í Sosialinum, er ætlað til eitt heilt vikuskifti. Hon krevur vitan um mangt og hvat, og ofta er neyðugt við ymsum hondbókum at hava til hjálpar. Orðabókin er altíð góð at hava. Eitt hampiliga gott atlas krevst eisini, helst størri enn tað føroyska Heimsatlassið.

Ofta er ein Almanakki góður, tá spurt verður um skip. Og leksikon er hent at hava. Men í mongum førum ber eisini til at fáa eitt gott prát við vinir ella kenningar, sum tú t.d. veitst eru kønir innan musikk, landalæru, kemi, ella vita nógv um teknikk, skip ella flogfør osfr. Tak telefonina, ring og spyr. Hesaferð er høvuðsevnið filosofi ella heimsspeki, og hetta er helst ikki alt almannavitan, hóast flestu munnu hava hoyrt um Platon og Sokrates. Í hesum føri er ein leksikon ella ein donsk »kryds-og-tværs ordbog« góð at hava við hondina.

Tú nýtir nokkso ofta fremmandorð, ella orð, sum menn royna at útrudda í dag, hví?

– Ja, eg brúki bæði tað sum kann kallast tungumál, skriftmál og fakmál. Oftani er tað, sum fer fram í hesi málreinsing, næstan tað sama sum ein sterilisering. Summi halda, at kvæðamál er tað einasta rætta føroyska. Kvæðamál er gott til kvøðing, tað veit eg.


Men nútíðar talumál er nakað heilt annað, livandi, við nógvum nyansum, nógvum orðaspæli. Bæði fremmandorð og lániorð, orð av donskum, bíbilskum ella eingilskum uppruna eru partur av tí livandi talumálinum.

Tit høvdu sjálvir eina yvirskrift á forsíðuni hetfyri, nakað um **leikandi børn.** Vanligt var í mínari tíð, at vit børn spældu. Vit leikaðu ikki blundikrógva, vit leikaðu heldur ikki kóboyar ella indianarar, nei, vit **spældu**! Og tað gera børn enn, men tíverri eru alt ov nógv, sum halda at hetta ljóðar ikki nóg hábærsligt.

(bladmaðurin rodnar).

Tað mál, sum fólk tala, er tað rætta talumálið! Men tað broytist allatíðina, og lagar seg til tey krøv, sum tíðin stillar. Hóast hetta, so ber væl til at tosa um gott og vánaligt mál.

Takk fyri, og góða eydnu!



AKKUMULATORAR
✦ TIL ØLL ENDAMÁL ✦



Fa. PÓLAR
v/ Margeir Ørvarodd
Sigmundarg. 26 /Rættará,
100 Tórsh.
Tlf./fax 18347 - 12860
Fartlf. 84347

ROKKJALLARIN

Vit átaka okkum at selja fyri fólk.
Eisini keypa vit deyðsbúgv.

ROKKJALLARIN - Tlf. 11990
Tinghúsvegur 42 - 100 Tórshavn

Samband

Hamparnaður síðst í 30-unum ynskir samband við kvinnu í hóskandi aldri. Full tagnarskylda.

Vinarligast skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn, viðmerkt:

Bill. mrk. 1022

Hús í Froðba

Húsini **Úti á Bakka** í Froðba til sølu.

Tlf. 12496

Opel Kadett

1.2 S, árg. 83, nýsýnaður, til sølu fyri kr. 12.000,-.

Tlf. 32023



dópast

Navnorðið dópur (-s -ar) merkir upprunaliga at drepa niður í vatn; dýva, doyva í el. undir kav. Uppruni tess er komin úr grikskum 'baptízein', ið eisini verður borin saman við enska orðið baptist, sum í átrúnaðarligum týdningi merkir 'at doypa'.

'Farið tí og gerið øll fólkasløgini til lærisveinar mínar, við tað at tit doypa tey í navns faðirsins og sonarins og hins heilaga anda'. Matt. 28,19.

Nú eru summi farin at siga dópast í staðin fyri doypast. Man hetta ikki vera komið í bland við tað danska 'døbes', ið sníkjandi er gliðið inn í mál okkara? Tað ljóðar ikki vakurt at siga dópast.

Gevið tí gætur, at vit hvørki skulu siga ella skriva dópast, tí tað er galið.

Fyrra dømi: Barnið skal doypast. Seinna dømi: Barnið verður doypt (umskrivaður formur við hjálparsagnorðinum 'verða'), er betri málbrúk.

Á sama hátt kunnu vit siga um orð, sum hava vendingar, sum t.d. biðjast, keypast og seljast, verður heldur mælt til seinna dømið.

R.

DANNY TRANSPORT

– tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 19192